2 ´arin Telefon: 311820 Fax: 314720 E-mail: post@sosialurin.fo

# ABBA segði nei til 7 mia krónur

**TÓNLEIKUR.** Svenski bólkurin ABBA fekk eitt so lokkandi tilboð um at spæla saman aftur, at annar av høvuðsmonnunum aftanfyri bólkin ivaðist í at taka av.

Men tá alt kom til alt, gjørdist hetta til einki.

Tað var ein bretskt-amerikanskur konsertfyriskipari, sum bjóðaði ABBA eina milliard dollarar (hetta svarar til umleið 7 milliardir í okkara pengum) fyri at finna saman aftur. Ætlanin var at senda ABBA á eina konsertferð til 100 býir kring heimin.

- Tilboðið var freistandi, men tað verður ikki til nakað. Hatta vóru nógvir pengar at siga nei til, men vit avgjørdu, at hatta var ikki nakað fyri okkum, sigur Benny Andersson við svenska Aftonbladet.

Tað eru nú næstan 20 ár síðani stórtíðina hjá ABBA, men bólkurin selur framvegis nógvan tónleik, og endurinnspælingar av sangnum hjá bólkinum eru bæði vanligar og væl umtóktar.

# Telduspøl elva ikki til harðskap

**TELDUSPØL.** Harðligu telduspølini, sum børn og ungum dáma so væl at spæla, elva ikki til harðskap í veruliga lívinum. Hinvegin eru hesi spøl við til at skapa og styrkja vinarbond. Hesa niðurstøðu kemur ein kanning hjá »Medierådet for Børn og Unge« til.



Danski felagsskapurin hevur kannað hvørja ávirkan útbreðslan av telduspølum hevur á børn og ung. Óttin fyri, at tey ofta blóðugu og ógvusligt telduspølini, har tað snýr seg um at skjóta, drepa og gera seg inn á hvør annan, hava við sær harðskap í veruliga lívinum, er ógrundaður.

Børn og ungum dáma avbjóðingina og kappingina í telduspølunum - ikki harðskapin. Harafturat spæla tey helst spølini saman við øðrum, og tí eru telduspølini við til at sjóða saman børn og ung.

**Telduspøl eru spennandi avbjóðingar hjá børnum og ungum**

# Fjølmiðlarnir vunnu týðandi sigur

**FJØLMIÐLAR.** Donsku fjølmiðlarnir hava vunnið ein týðandi sigur í einum máli, sum kundi havt stóra ávirkan á arbeiðsumstøðurnar hjá teimum.

Løgreglan í Keypmannahavn hevur ligið úti eftir myndum og øðrum tilfari frá ófriðinum á Nørrebro í Keypmannahavn í november mánaði. Teir vildu hava alt tilfarið frá fjølmiðlunum, so teir kundu finna fram til fólk, sum gjørdu um seg undir ófriðinum.

Fjølmiðlarnir hava noktað fyri at lata løgregluni sjónvarpsupptøkur og myndir, og bæði býarrætturin í Keypmannahavn og síðani Eystari Landsrættur hava nú biðið løgregluna í Keypmannahavn halda fingrarnar burtur frá upptøkunum og myndunum hjá fjølmiðlunum.

# Fólk streyma til íslendskan film

**FILMUR.** 60.000 fólk - ella fjórði hvør íslendingur - hava nú sæð filmin *Einglar alheimsins*, sum er gjørdur eftir skaldsøgu hjá Einar Már Guðmundsson, sum fekk bókmentavirðislønina hjá Norðurlandaráðnum í 1995.

Filmurin er gjørdur í Íslandi, men hann er fíggjaður við norðurlendskum pengum - millum annað frá norðurlendska films- og sjónvarpsgrunninum, sum hevur latið 2 milliónir norskar krónur. Tað er Friðrik þór Friðriksson, sum hevur leikstjórnað filmin.

Filmurin snýr seg um eldra beiggja rithøvundan, sum stríðist við at finna eitt pláss í samfelagnum. Hann verður alsamt meira tyngdur av veruleikanum og endar á eini psykiatriskari deild.

Filmurin kann samanlíknast við meistaraverkið hjá Milos Forman, Geykareiðri, sum hevur líknandi humor og allatíðina spyr spurningin um, hvør tað nú er, sum er ørur.

**Subject:** Teldubræv
**Date:** Tue 8. feb. 1999
**To:** post@sosialurin.fo
**From:** fgaini@iname.com
**Reply to:** fgaini@iname.com

TELDU-POSTURIN

# ALLO ALLO!

Á gongubreytini uttan fyri ein klædnahandil í rue d´Orsel sá eg tann gamla mannin hvørt kvøld. Heimleysur og einsamallur. Hann livdi "í eisemi millum fólk", sum Sartre tekur til, og soleiðis ímyndi eg mær, at hann hevði livað í minst tredivu ár! Maðurin var afrikanari av uppruna (helst úr gomlum fronskum hjálandi), hevði tunt grátt skegg og eitt uppbólgnað kinnareytt andlit. Hann hevði ein gamlan toyposa at goyma soviposan og teppið hjá sær í. Tómoygdur stóð hann har, skitin og ússaligur á at líta, og hugdi at impulsiva fólkalívinum á gøtuni. Sum ein fremmandur av aðrari gongustjørnu, uttanfyri sjónarhorn hins integreraða, fór hann haltandi eftir gøtuni við posa í einari hond og ásettari vínfløsku í hinari. Hvørt kvøld um somu tíð og á sama stað legði hann seg í soviposan á gongubreytini í rue d´Orsel. Tað gjørdi hann fáar tímar eftir, at handlarnir á gøtuni høvdu latið aftur fyri dagin. Um dagin helt hann til onkra aðrastaðni í býnum, tí tá var onki óvanligt at síggja á gongubreytini.

Stutt áðrenn eg flutti úr París, sá eg fyri fyrstu ferð "fremmandamannin" á eini heilt aðrari gøtu. Eg var farin at spáka mær ein túr í góðveðrinum og komin til Boulevard de la Chapelle sá eg ein hann sita undir einum av stóru betongpelunum, ið bera skinnararnar til tokini. Á Boulevard de la Chapelle hevur man metro´ina uppi yvir sær og ikki undir fótunum. Tað var næstan onki menniskja at síggja á hesum økinum beint undir jarnbreytini, sum liggur í miðjuni á boulevardini. Sum eg gekk og válaði, við tokferðslu beint niðanfyri og bilferðslu til bæði vinstru og høgru, bar eg eyga við fleiri onnur húsvill, sitandi í skugganum undir betongpelum. La Chapelle er fátæksligur býarpartur við nógvum innflytarum úr Afrika, sum liggur norðaliga í býnum.

Nú hendi tað merkisverda, ið hevur brent seg fast í mínum minni. Tann gamli frá rue d´Orsel, ið hálvsovandi sat við tveimum hálvfullum vínfløskum framman fyri sær, háláði uttan ávaring eina fartelefon upp úr einum jakkalumma. Hann helt telefonini framman fyri sær, hugdi forvitin og forvirraður at tólinum, og trýsti síðan á nakrar knøttar. Um hann hevur funnið ella stolið fartelefonina veit eg ikki. Um hon yvirhøvur riggaði er mær eisini ivasamt. Og hvønn skuldi hin heimleysi so ringt til? Hetta var ein tann mest surrealistiska hending mær enn hevur verið fyri. Eg ætlaði mær at taka eina mynd av manninum við fartelefonini, men júst tá ið eg gjørdi fototólið klárt, hugdi hann meg beint í eyguni, og ongin mynd varð tikin. Eg var annars farin út við tí fyri eyga, at fáa nakrar góðar heystmyndir av teimum parisisku boulevardunum. Ein mynd av hesum kloddafylinum við hátøknifrøðiligari fartelefon í nevanum hevði verið ein góður fotografiskur fongur hjá mær, men eg helt tað ikki vera rætt at taka myndina uttan fyrst at biðja um loyvi til tað.

Myndin kundi verðið nýtt til eina stóra lýsing fyri Motorola: "Sjálvt tey heimleysu hava fartelefon í dag!" ella "Hesin maðurin ringir til síni kæru dóttir í USA". Fleiri aðrir lýsingarmøguleikar eru. Myndin kundi eisini verið nýtt í bók um okkara sokallaðu internationalu tíðarøld. Heimurin sigst vera tætt samanknýttur í altjóðliga felagseind vegna alnetið, sjónvarpsrásir, telesamskifti, altjóða felagsskapir og so framvegis. Heimurin er vorðin sera lítil og standardiseraður, at døma eftir nevndu samfelagsáskoðan. Nú kanst tú ferðast kring jørðina eftir fáum minuttum við alnetinum ella satelitt-sjónvarpi. Jú, tað er rætt, at tað ár 2000 er sera stutt millum Tokyo og Tórshavn ella millum París og Bombay, men frástøðan millum tey vælhavandi og tey fátøku er als ikki minkað samsvarandi, heldur tvørturímóti. Landamørkini hava í nógvum førum mist týdning og millumlanda-samskiftið hevur ment seg øgiliga nógv, men samstundis er munurin millum tey, sum hava atgongd til øll hesi luksustól, og hini vaksin. Tey marginaliseraðu og arbeiðsleysu hava tað als ikki lættari enn fyrr, tí internationaliseringin fevnir í størstan mun um undirhald og keyp og søla. Tað er nýtslumentanin, ið vinnir fram í øllum heimspørtum.

Tá ið eg fari norður aftur til Danmarkar og Føroyar við toki og flogfari, so pakkar hin gamli í rue d´Orsel soviposan hjá sær saman eftir enn eina nátt á asfaltinum. Hansara heimur strekkir seg fáar hundrað metrar, frá rue d´Orsel til Boulevard de la Chapelle - tað er eitt sera lítið øki í tí norðara partinum av París. Hann kann ikki ferðast sum eg, hvørki í geografiskum rúmi ella á alnetið og um telesamskiftið. Hann hevur onki virði í postindustriella samfelagnum. Hann kann ikki nýtast til nakað, sum er búskaparliga rationelt, og telefonina, sum hann situr við, kann hann bara brúka til hamara ella umbýtislutur. Myndin av manninum við fartelefonini vísir okkum í veruleikanum, hvussu djúp grøvin er millum ár 2000-steinaldarmannin og hátøknifrøðilig tól. "Allo allo!" - Hvussu stórt framstig er hetta ikki fyri menniskjaættina? At standa millum heimleys og biddarar á gøtuni og fortelja konuni, hvat livurpostei hon í dag skal keypa í handlinum. "Heimurin má vera ungur enn", segði Nordahl Grieg aftaná seinna heimsbardaga. Og tað sama kann ein siga ár 2000, uttan harvið at vera dapurskygdur.

**Firouz Gaini, París**

post@sosialurin.fo



# FØÐINGAR

29. januar fingu Anna Maja Mortensen og Ulf Norddahl, Keypmannahavn, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 2900 gr.

30. januar fingu Ella Hovsgarð og Bergur Debes, Froðba, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3300 gr.

1. februar fingu Marjun Nielsen og Sverri Heinesen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3700 gr.

2. februar fingu Durita Kirke og Henning Pedersen, Brørup, ein son. Hann var 46 cm. langur og vigaði 1900 gr.

2. februar fingu Sonja og Petur í Gong, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3700 gr.

4. februar fingu Jóhanna og Heðin Poulsen, Skála, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4050 gr.

4. februar fingu Joan Joensen og Leif Hovgaard, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 3800 gr.

5. februar fingu Anja Næss og Kristoffur Gaardlykke, Miðvági, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3700 gr.

5. februar fingu Elin Ludvig og Flemming Foget Johannesen eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3500 gr.

7. februar fingu Rannvá og Eyðálvur Nielsen, Rituvík, eina dóttur. Hon var 49 cm. long og vigaði 2650 gr.

7. februar fingu Dagmar Clothier og Mikkjal Helmsdal, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3300 gr.

8. februar fingu Edel M. Davidsen og Káti G. Simonsen, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 3645 gr.

8. februar fingu Maria og Olfrid, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3800 gr.

8. februar fingu Randi og Palli Petersen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3900 gr.

8. februar fingu Augusta Mikkelsen og Jón Kragesteen, Tórshavn, ein son. Hann var 59 cm. langur og vigaði 4400 gr.

9. februar fingu Maria og Hjaltur Poulsen, Klaksvík, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4410 gr.

9. februar fingu Erla H. Smith og Ingi S. Joensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3600 gr.

9. februar fingu Rannvá Amalia Hansen og Petur Nolsøe, Kaldbak, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3350 gr.

9. februar fingu Maria N. Gram og Svend Heinesen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3350 gr.

9. februar fingu Jonna og Jens Klæmint Jacobsen, Norðragøtu, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3650 gr.

10. februar fingu Sunrid Petersen og Leivur Ree Torvadal, Hoyvík, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4200 gr.

10. februar fingu Finngerð Egilsnes, Vestmanna og Ingolf Debes, Oyri, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3650 gr.

# ANDLÁT

3. februar:
**Thomas Herluf Thomsen,** Lopra, vanliga nevndur Herluf, 82 ára gamal.
**John Sigurd Dahl Olsen,** Oyndarfirði, sonur Fíu og Hans Petur Olsen, 19 ára gamal.

4. februar:
**Hákun Midjord,** Hvalba, 86 ára gamal.

5. februar:
**Súsanna á Sondum Henriksen**, Sandi, 36 ára gomul.
**Finnbogi Dam Jacobsen,** Tórshavn, 59 ára gamal.

7. februar:
**Lena í Buð,** Hvannasundi, 89 ára gomul.
**Edith Vidtfeldt,** Sandi, 80 ára gomul.
**Bodil Poulsen,** ættað úr Skopun, búsitandi í Havn, 82 ára gomul.

# KIRKJUR & SAMKOMUR

## Gudstænastur 6. sunnudag eftir trettanda

*Viðareiði:* kl. 16, familjugudstænasta, barnakór syngur Meinhard Bjartalíð. (Aftan á verður hugnaløta í Missiónshúsinum)
*Klaksvík:* kl. 11, Niels Pauli Danielsen
*Klaksvíkar Sjúkrahús:* kl. 10, Hans Eiler Hammer
*Kunoy:* kl. 12, altarg., Hans Eiler Hammer
*Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Hans Eiler Hammer
*Eiði:* kl. 11.40 skriftamál, kl. 12 messa, Emil Olsen
*Norðskála:* kl. 17 messa, Emil Olsen
*Gøta:* kl. 12, altarg., Peter O. K. Olofson
*Glyvrar:* kl. 11, deyvagudstænasta, altarg., Jónsvein Bech. (Talvan gongur fyri deyvameinigheitina)
*Selatrað:* kl. 12, Jógvan Fríðriksson
*Sjóvar kirkja:* kl. 12, lestur
*Sjóvar kirkja:* kl. 15, ítróttargudstænasta, Jógvan Fríðriksson
*Tjørnuvík:* kl. 12, Martin R. Jacobsen
*Vestmanna:* kl. 12, Uni Næs
*Kollafjørður:* kl. 12, Marjun Bæk
*Havnar kirkja:* kl. 11, Sonja Klein
*Vesturkirkjan:* kl. 11, lestur
*Argir:* kl. 11, altarg., Sverri Steinhólm
*Bøur:* kl. 12, David Johannesen
*Dalur:* kl. 12, Jákup Reinert Hansen
*Hvalba:* kl. 12.30, prestainnsetan, Bjarni Bæk innsetur Ólav Rasmussen

## Frá Ebenezer

Sunnudag kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti og kl. 21 útimøti. Mánadag kl. 20 bønarmøti.

## Tórshavnar Hvítusunnusamkoma

Sunnudag morgunmøti kl. 11. Kl. 12.15. Sunnudagsskúl. Kl. 18 Evangeliskt møti.

## Samkoman Immanuel

Sunnudagin kl. 13 Sunnudagsskúli, sunnukvøldið kl. 19 er møti.

## Filadelfia, Landavegur 22

Í dag kl. 6 Morgunbøn, kl. 17 Landsbøn, í morgin kl. 6 Morgunbøn, kl. 11 Morgungudstænasta, kl. 18 Møti, kl. 22 Útimøti (um viðrar). Mánadagin kl. 6 Morgunbøn, kl. 20 Bønarskúlin.

## Missiónsvika á Argjum

Leygarkvøldið kl. 20 Møti við Regin Høgnesen. Ung av Argjum syngja. Innsavnað verður til húsið.

Sunnudagin kl. 14 Familjumøti við Kristian Matin Petersen, Teen-Sing syngja, kl. 18 Møti við Niels Jacob Nielsen, Argjakórið syngur. Innsavnað verður til Heimamissiónna.

## Meinigheitin í Hoyvík

Sunnudagin í Hoyvíkar skúla, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 er bøn og kl. 18 er møti, har fólk úr Tjørnuvík verða við.

Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti hjá Sofrid og Sámal í Depli, Tjarnalág 14.

Verið øll hjartaliga vælkomin

## KFUM og KFUK í Havn

Mánadagin kl. 15.00 í KFUK: Eldrasamkoma við Steinbjørn B. Jacobsen, evni: Háskúlin 100 ár.

Týsdagin kl. 16.00 í KFUK: Várgleði fyri børn.

## Frelsunarherurin í Havn

Sunnudagin kl. 11 Møti, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18 Møti. Finngerð Djurhuus Olsen talar.

## Rhema á Hálsi

Leygarkvøldið kl. 21 Café-kvøld. Bill Justinussen luttekur við sangi og vitnisburði.

Sunnudagin kl. 17 Møti og Sunnudagsskúli.

Øll eru vælkomin.

## Kvívík

Møti verður í Glæmuni sunnukvøldið kl. 19 við Regin Høgnesen. Magni Christiansen syngur. Øll eru vælkomin.

## Gøtu kirkja

Í kvøld kl. 20 Møti við Una Næs, presti. Streingjakórið av Toftum syngur. Innsavnað verður til Heimamissiónina.

Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Alfred Petersen. Trinitatis syngur.

## Keldan, Skálafirði

Leygarkvøldið kl. 21: Opið hús, ungdómur úr Imanuel luttekur.

Sunnudagin møti kl. 17, Annika við Skipá tosar um evnið: Familjan. Barnamøti kl. 17.

## Missiónshúsið í Leirvík

Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20 við Vagn Foldbo. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Samkoman Ørkin

Evangeliskt møti verður í Arbeiðsmannafelagshúsinum »Hæddini« í Saltangará sunnudagin kl. 17.

## Missiónshúsið í Skopun

Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18.30 Lovsang- og bønarmøti, kl. 19 Møti.

## Missiónshúsið á Tvøroyri

Í kvøld kl. 18 Møti við Kaj Eyvindsson og Johan Thomsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Missiónshúsið í Porkeri

Í kvøld kl. 20 Ungdómsmøti. Ung úr Vágunum luttaka. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Betel, Vágur

Í kvøld kl. 20: Uppbyggingarfundur við Poul Færø og Jákup Eli Øster.

Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli og kl. 18 Evangeliskur fundur við Poul Færø og Jákup Eli Øster.

Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Týsdagin kl. 20 Kvinnufundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

## Samkoman, Sion Vági

Sunnudag: kl. 11: Morgunmøti, kl. 11.30: Sunnudagsskúli, kl. 18: Evangeliskt møt .

Telefonandaktin svarar á 373777.

## Århus

Møti verður í missiónshúsinum Carmel í Århus leygarkvøldið 19. februar kl. 19.30. Luttøka úr Esbjerg.

## Silvurbrúdleyp

**Mánadagin 14. februar hava hjúnini Meta og Hans av Fløtum, Lambagerði 8, Tórshavn, gullbrúdleyp.**

**Dagurin verður hildin saman við familjuni.**

## Brúdleyp

**Leygardagin 11. mars giftast í Hvalbiar kirkju, Noomi Hammerfoss, Froðba og Danjal Olsen, Hvalba.**

**Vælkomst verður í Royn-høllini kl. 19.30. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 375071 ella 375129, í seinasta lagi 26. februar**

## Læknavaktir

**Tórshavn:**
*Læknavaktin* tlf. 310033.

**Eysturoy:**
*Leygardagin 12. feb.:* Kári Rasmussen, tlf. 447010
*Sunnudagin 13. feb.:* Pól Johs. í Horni, tlf. 444038

**Norðoyggjar:**
Magnus Magnusssen, tlf. 455451

**Vágar:** tlf. 332413

**Suðuroy (norður):**
Tlf. 371560

**Suðuroy (suður):**
Tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13–14. Tlf. 314544.